# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tóta og Oda føðingardag í Sjónleikarhúsinum:

## Um 350 fólk í 120 ára føðingardag

**Leygardagin var 120 ára føðingardagur hildin í Sjónleikarhúsinum í Havn í sambandi við at tvíburasystrarnar Tóta Sørensen og Oda Andreasen fyltu 60 ár**

Nógv fólk komu á gátt og talur vórðu hildnar. Umframt familju, vinir, og kenningar, komu eisini nógvir starvsfelagar og kundar hjá føðingardagsbørnunum.

Bæði Tóta og Oda kenna nógv fólk og koma í samband við nógv fólk í sínum arbeiði.

Báðar eru tær sjálvstøðugar vinnurekandi og arbeiða í sama grannalag í miðbýnum í Havn, Tóta sum frisør og Oda sum zoneterapeutur. Oda arbeiðir eisini sum pleygari á deild 6 á Landssjúkrahúsinum.



*Tvíburasystrarnar Tóta Sørensen og Oda Andreasen hildu sín 60 ára føðingardag í Sjónleikarhúsinum seinasta leygardag*

*Mynd: Johnny Lohse*



*Borðreitt var við nógvum góðum. Á myndini síggjast Regin og Vilbjørg Eikhólm, Solveig Sørensen, og Martin Røsvik*

*Mynd: Johnny Lohse*



*Tóta og maðurin, Sørin Pram Sørensen*

*Mynd: Johnny Lohse*



*Jens Mohr og konan, Hervør*

*Mynd: Johnny Lohse*



*Guðrið Wilhelmsen og mamman, Sigga Jensen*

*Mynd: Johnny Lohse*



# Tosið um skattalætta og lønarsteðg er ræðandi

**– Ætlaðu samráðingarnar um lønarsteðg afturfyri at skattir og avgjøld skulu lækka, hanga í einum ógvuliga kłønum trái**

TRÝPARTA-SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Tað er stórur vandi fyri, at hetta fer at forkoma tí samhaldsfasta samfelagnum og tað er ræðandi, sigur Gunnleivur Dalsgarð*

– Tosið um lønarsteðg í Føroyum er ræðandi.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, vil framvegis ikki hoyra talan um trýpartasamráðingar ímillum fakfeløg og arbeiðsgevarar øðrumegin og Landsstýrið hinumegin um kostnaðarstøðið í Føroyum.

Tosað hevur leingi verið um at fakfeløgini og arbeiðsgevarafelagið áttu tikið samráðingar upp við landsstýrið um kostnaðarstøðið í Føroyum. Í tí sambandinum skuldi fakfeløgini binda seg til at halda aftur í lønarkrøvunum, ella kanska enntá góðtaka, at lønin als ikki hækkar meiri. Afturfyri skuldi landsstýrið binda seg til at klkka skattir og avgjøld.

Men í Sosialinum í gjár segði Bárður Nielsen, at skuldi slíkar samráðingar verða, mátti øll tey umleið 40 fakfeløgini í landinum fyrst semjast um eitt felags útspæl.

Tað verður neyðugt at landsstýrið fær ein – og bara ein – part av samráðast við og tí mugu øll fakfeløgini standa saman um eitt útspæl til landsstýrið hesum viðvíkjandi, heldur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum.

Hann sær nevniliga stórar trupulleikar fyri sær, skuldi tað hent, at landsstýrið ger avtalur við nøkur fakfeløg, sum onnur fakfeløg síðani ikki vilja góðtaka.

Hingartil er tað bara arbeiðarafeløgini og arbeiðsgevarafelagið, sum hava tosað saman um trýpartasamráðingar og tey skuldu hava fund aftur í næstum, har tey skuldu royna at finna eitt felags útspælt til landsstýrið.

Men eftir tí, sum Bárður Nielsen sigur, verður tað neyðugt, at tey fáa øll hini yvir 30 fakfeløgini á almenna og privata arbeiðsmarknaðinum við fyri at ætlanin kann gerast veruleiki

### Hanga í kłønum trái

Men nú er tað greitt, at trýpartasamráðingar um kostnaðarstøðið í Føroyum hanga í einum ógvuliga kłønum trái.

Starvsmannafelagið er eitt tað størsta og máttmiklasta fakfelagið í landinum við túsundtals limum.

Og Starvsmannafelagið vil ikki hoyra talan um at vera við í slíkum trýpartasamráðingum.

– Vit hava altíð hildið at spurningurin um skattir og avgjøld og spurningurin um sáttmálasamráðingar, eru fullkomiliga hvør sítt smál, sum undir ongum umstøðum skulu blandast saman, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum

– Og tað støðuna hevur felagið enn, sigur hann.

Hann sigur, at spurningurin um sáttmálasamráðingar eru um at fáa eina rættvísa løn fyri útint arbeiði.

Spurningurin um skattir og avgjøld er hinvegin ein spurningur um, hvussu nógv tað almenna skal krevja frá fólki fyri at varðveita tær tænastur, sum tað almenna eigur at veita í einum framkomnum samfelagi.

– Og tað almenna eigur ongantíð at krevja meiri í skatti og avgjøldum, enn neyðugt.

### Útlitini ræðandi

Men Gunnleivur Dalsgarð ávarar eisini staðiliga ímóti trýpartasamráðingum, har skattalættar og lønarlag verða tvinnað saman.

– Eg stúri fyri, at verða hesi bæði tengd saman, fer skattalættin at enda at føra við sær, at vælferðarsamfelagið verður skert.

– Verður skattalættin ov stórur, fær tað almenna minni at ráða yvir. Og sostatt fær tað almenna eisini minni ráð til at veita borgarunum tær tænastur, sum vit vanliga nevna vælferðartænastur.

– Hetta eru natúrligar tænastur í einum vælferðarsamfelagi, sum vit øll eiga at fáa ágóðan av, uttan mun til, hvørja støðu, hvør einstakur hevur í samfelagnum.

– Spurningurin er so, hvar hesar tænastur so enda, tá ið tað almenna ikki hevur ráð at veita tær longur?

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at enda hesar tænastur á privatum hondum, er vanlukkan fullkomin.

Hann sær fyri sær, at endin verður, at tey, sum frammanundan hava lága løn, eisini skulu noyðast at gjalda fyri natúrligar vælferðartænastur, sum eru grundleggjandi eftir hansara tykki og sum vit øll eiga at betala til, samhaldsfast.

– Sostatt er stórur vandi fyri, at alt hetta tosið um trýpartasamráðingar at enda kunnu forkoma tí samhaldsfasta samfelagnum, sum vit byggja okkara tilveru á.

– Hetta eru ræðandi útlit, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

– Harafturat sita politikararnir við tí valdinum, at skuldi tað hent, at tað manglar í onkustaðni, so kunnu teir altíð krevja meiri inn í skatti.

– Ein rímiligur skattur er hinvegin tað, sum tryggjar okkum tað samhaldsfasta samfelagið, sum vit liva í og sum vit eiga at varðveita, leggur hann afturat.

# Harmast um líkasælu

**Formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, heldur, at tað er hent alt ov lítið í málinum um trýpartasamráðingar um kostnaðarstøðið í Føroyum**

TRÝPARTA-SAMRÁÐINGAR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*Tað er alt ov lítið hent. Men hendir onki, stúri eg fyri gongdini, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

Tað var formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag, sum á sinni luftaði tankan um trýpartasamráðingar um lønarlagið í Føroyum.

Hans Joensen mælti til, at fakfeløg og arbeiðsgevarar tosaðu saman og fóru til landsstýrið við einum felags uppleggi. Endamálið skuldi vera, at fakfeløgini bundu seg til at lataveravið at krevja lønarhækking. Men afturfyri skuldi landsstýrið binda seg til at lækka skattir og avgjøld munandi, so at keypiorkan kundi veksa, hóast lønin í krónum og oyrum, stendur í stað.

Endamálið skuldi vera t forða fyri, at kostnaðarstøðið ikki hækkaði meiri, tí tað er longu so høgt, at tað er ein bági fyri kappingarførið hjá vinnuni.

Men eitt aðalmál hjá formanninum í Havnar Arbeiðsmannafelag er eisini, at gjógvin ímillum tey tímaløntu á privata arbeiðsmarknaðinum og tey fastløntu á almenna arbeiðsmarknaðinum ikki skuldi gerast enn djúpari enn hon er.

Tað merkir, at lønarmunurin ímillum tey alment løntu og tey tímaløntu, skuldu ikki veksa meiri tí nú má stættarmunurin ikki veksa meir.

Hetta var orsøkin til verkfallið seinast og tað stendur Hans Joensen framvegis fast við.

Men Hans Joensen harmast um, at alt ov lítið er hent í spurninginum um trýpartasamráðingar.

– Tað sær út til at líkasæla valdar á økinum, sigur hann.

Tað hevur verið ein fundur og ein skuldi vera aftur nú. Men hann hevur onki hoyrt og tað sær ikki út til at nakar hevur hug at tosa um viðurskiftini, sigur hann.

Kortini heldur hann at tað er framvegis ætlanin at fáa eitt kjak ílag um hesi viðurskiftini fyri at vita um tað ber til at koma víðari.

Hann sigur at hann hevur fingið tað fram, sum hann hevur havt upp á hjartað.

– Bólturin er spældur til politikarar, fakfeløg og arbeiðsgevarar, men tað tykist ikki sum at tað er nakar serligur hugur til at tosa um trýpartasamráðingar.

Men eitt er greitt, staðfestir hann: Skulu vit hava lønarsteðg fyri at hjálpa vinnulívinum, skulu vit hava bindandi avtalur frá landsstýrinum um skatta- og avgjaldslætta og vit skulu eisini hava bindandi avtalur um, at fleiri avgjøld verða ikki sett í gildið. Tað hevði eisini verið skilagott at fingið eitt príseftirlit, so at ikki prísirnir hækka ógrundað.

Kortini heldur hann, at okkurt má gerast.

– Heldur hendan gongdin fram, har bæði lønir og prísir verða trýst uppeftir, stúri eg fyri gongdini, sigur Hans Joensen.

– Hinvegin haldi eg, at fingu vit eina avtalu við landsstýrið um lønir, skattir og avgjøld, høvdu vit sloppið undan nógvum ósemjum og kanska høvdu vit enntá sloppið heilt undan verkføllum.

### Ov tíðliga

Jan Mortensen í Vinnuhúsinum sigur, at gongd er í málinum. Arbeiðarafeløg og arbeiðsgevarar hava havt ein fund og skulu hava ein aftur í heyst.

Á hesum fundinum skulu partarnir tosa um, antin tað ber til at semjast um nøkur felags tiltøk.

Hvat úrslitið verður, er alt ov tíðliga at siga nakað um enn.

Men endamálið er eisini at byggja eitt størri álit upp ímillum partarnar.